

ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo



*Steinurin hjá Mariu er høgrumegin og tann hjá hjá soninum Arna er vinstrumegin. Niðast á báðum steinum stendur: Elsket og savnet*

# Langomma Frank Arnesen er grivin í gamla kirkjugarði

Tað var ein tíð, tá ið øll í danska ríkinum kendu danska fótbóltsleikaran Frank Arnesen. Umframt hann kendu nógvir føroyingar Otto Brimheim og Herluf Arnason.

Vit hava í dag frásøgn um gravsteinin hjá Mariu Arnason, sum var langomma Frank og mamma hinar báðar. Hennara søga er ein syrgilig, men tá í tíðini vanlig søga, um, hvussu hørð lagnan kundu vera hjá fólki.

Søgan hjá ættini var í 1984 skrivað í blaðnum Nú, har Herman Jaobsen var blaðstjóri. Í blaðnum greiddi Otto frá søguni hjá mammu síni og húsfólkunum annars.

Pápi Otto var Svenn Arnarson, sum var ættaður av Brimnesi í Íslandi. Mamman var Maria, sum var dóttir Heina á Trøðni í Havn. Tey bæði hittast í Íslandi, har tey eisini giftust. Tey flyta síðan til Føroyar og fluttu inn í húsini á Brekku í Krókabrekkuni, har børnini vórðu fødd og vuksu upp. Tey blivu fimm systkin. Arne var føddur í 1900, Herluf í 1902, Steintór í 1903, Otto í 1904 og Anna í 1910.

## Pápin doyði frá fimm børnum

Undir fyrra heimsbardaga var Svenn skipari á einum lektara í Keypmannahavn. Ein morgun í 1918, tá ið teir lógu við bryggju í Fríhavnini, kemur Malmøferjan við fullari ferð og siglir beint inn í síðuna á lektaranum. Svenn búði einsamallur har afturi, meðan manningini annars búði har frammi. Skipið kvettist í helvt, og afturendin sakk alt fyri eitt. Manningin har frammi bjargaðist, men Svenn var innilæstur í aftara partinum og slapp ikki upp.

Lektarin var seinni tikin upp, og líkið av Svenn varð funnið og jarðað í Keypmannahavn.

Mamman situr nú einkja við fimm børnum í Havn, men henni varð eisini stutt lív lagað. Hon doyði í Havn bert tvey ár seinni í 1920, 48 ára gomul. Hon varð jarðað í gamla kirkjugarði tann 12. februar. Anna, systirin, fór til ommuna úti á Skansavegnum, og so vóru teir fýra beiggjarnir einsamallir í húsi. Nakað eftir fór Arni, sum var brekaður, niður á Vanføruheimið at læra til bókbindara. Hann doyr í 1932, 32 ára gamal og verður jarðaður 9. november í gamla kirkjugarði undir liðini á mammu síni.

## Herluf

Herluf fór longu sum 14 ára gamal til sjós, og ætlanin var, at hann skuldi fara á skiparaskúla. Men soleiðis vildi lagnan tað ikki. Hann fekk ein húk í eygað og misti tað, so fyri hesum brast øll vón. Hann fekk glaseyga, og tað var sagt, at hann plagdi at undirhalda børnini í familjuni við fyrst at taka tenninar úr munninum og síðan taka eyga úr, meðan børnini spent bíðaðu eftir, hvat mundi blíva tað næsta! Herluf var eisini nógv ár til skips. Umframt hetta róði Herluf út, mong minnast, hvussu frálíka góður útróðrarmaður hann var. Hann var sera virkin í Ebenezer, og tey eru fleiri sum minnast, hvussu væl hann dugdi at syngja.

Hann varð giftur við Masu, sum var ættað úr Trongisvági. Hon var sjúkrasystir í mong ár.

Tá ið Arni kemur heim aftur úr Danmark byrjaðu teir báðir bókbindaravirki saman við Onnu.

## Otto

Otto fór sjálvur sum 15 ára gamal niður, fyrst á eitt mjólkarvirki og síðan í kokkalæru. Tá ið hann var liðugur við hetta, varð hann innkallaður til marinuna í eitt ár og sigldi eisini uppá Føroyar.

Í 1929 mynstraði hann umborðá ferðamannaskipið Tjaldur, har hann var til 1930, tá ið hann fekk kjans sum hovmeistari við ØK skipinum Afrika. Í 1932 fekk hann starvið sum hovmeistari á Smiril, sum tá var nýggjur. Otto arbeiddi annars í nógv ár á skipasmiðjuni í Havn.

Anna fór til Danmarkar at læra til bókbindara og varð verandi har. Hon var fyrsta føroyska kvinnan, ið tók sveinabræv innan hetta yrki og fekk eisini heiðursmerki. Hon starvaðist síðan hjá Rosenkille & Bagger, har hon fekst við at bøta um gamlar bøkur.

Kona Otto var Anna við Keldu úr Leirvík. Tey áttu fýra børn, og tey vóru:

Maud Heinesen, sum er mamma at Elini og Marionnu

Svenn Brimheim, sum er pápi at Anniku og Eilif

Elsubu, giftist til Amerika, og er mamma at Scott, Onnu, og Miu Ellis

Lisa-Maria, býr í Noregi, er mamma Eleinu, Ingvør, Súsonnu, Gunnhild, Høgna og Jógvan Brimheim Gunnarsson

## Steintór

Steintór fór til Danmarkar at læra timburmsíð. Hann verður verandi og giftist við Gunhild, og tey fáa sjey børn.

Millum hesi eru John Otto, sum er pápi Frank Arnesen. sum nú arbeiðir fyri Chelsea. Tey eru tvey systkin. Eitt av arbeiðunum hjá Frank er at finna og menna talentir á vøllinum. Eitt av hesum sigst vera Ronaldo.

Steintór doyði longu 55 ára gamal.

Arne, Herluf og Anna vóru barnleys.

## Ættin kemur av Skipanesi

Her kann eisini verða skoytt uppí, at Heini av Trøðni, pápi Mariu, var ættaður av Skipanesi. Foreldrini hjá honum vóru millum fyrstu niðurseturfólkini á Skipanesi. Pápin var Justines Heinesen, ættaður av Brúnni í Norðragøtu og mamman var av Toftum.

Fyrstu niðursetufólkini á Skipanesi vóru Jacob Niclassen av Skála og Súsanna Maria Joensdatter, sum var ættað úr Steikarhúsi í Kopargøtu í Havn. Tey næstu vóru Frederik Mikkelsen, úr Jolluni í Kollafirði, og triðja húsi var hjá ommu og abba Mariu.



*Maria Arnason fekk eina harða lagnu.*



*Svenn Arnason, doyði frá konu og fimm børnum*



*Arne og Herluf (elsti og næstelsti) standa. Otto (yngstur) og Steintór, vanliga kalladur Stendor sita. Anna var yngst.*




## Komandi frásøgn

Komandi frásøgnin verður um Angelicu Jacobsen. Hon var ein av fyrstu jarðamøðrunum, sum var útbúgvin í Danmark. Hon fekk eina harða lagnu. Hon gjørdist ung einkja, og einkardóttirin doyði á barsilssong blaðung.